# Ekslusivar sjálvstýrisatkvøður



*Kári Højgaard vil gera nógv fyri at sleppa í samgongu*

**-Við einum manni verður tað ógvuliga tungt at sita í andstøðu, sigur nývaldi Kári Højgaard, einasti tingmaður sjálvstýrisflokksins og hann vil gera nógv fyri at sleppa í samgongu**

POLITIKKUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Sjálvstýrisveljarin er í eini serstøðu í Føroyum, tí ongin onnur atkvøða hevur so stóra makt sum sjálvstýrisatkvøðan. Tað vísir seinasta løgtingsvalið, tað vísa undanfarin val. Sjálvstýrisflokkurin hevur við avtaluni við Fólkaflokkin verið annar bólkurin, sum hevur hildið politisku skipanina í Føroyum niðurbundna við einum hvørkrataki seinastu dagarnar. Við bara 1349 av teimum 30537 atkvøðunum, sum vóru latnar við seinasta løgtingsval, hevur sjálvstýrisflokkurin útilokað aðrar møguleikar enn at fáa javnaðarflokkin við í eina breiða samgongu. Sambandsflokkurin er úti í kuldanum. Blokkurin Sjálvstýrisflokkurin, Fólkaflokkurin telir 7612 atkvøður. Andstøðublokkurin, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin telja 15.605 atkvøður.

Kári Højgaard einasti tinglimur sjálvstýrisflokksins, vil gera nógv fyri at sleppa í eina samgongu.

-Sum einsamalt umboð fyri flokkin á tingi fáa vit lítla ávirkan, enda vit í andstøðu. Tað hevði verið ógvuliga óhugaligt at siti í andstøðu næstu fýra árini, sigur Kári Højgaard.

Tit fingu ikki góða undirtøku frá veljaranum til seinasta løgtingsval. Sjálvstýrisflokkurin og fólkaflokkurin vóru einastu flokkar sum misti mann á tingi. Er tað tá rætt at fara í alliansu við ein annan flokk soleiðis beinanvegin, nú veljarin hevur sagt sín dóm?

- Eg haldi ikki vit kunnu siga, at tað er politikkurin hjá sjálvstýrisflokkinum sum er orsøkin til vánaliga valið. Vit fingu eitt vánaligt val av innanhýsis trupulleikum. Tað kann vera, at okkara veljari helt, at tað gekk dekan og skjótt trý tey fyrstu árini í seinasta valið, men seinasta árið hevur verið hóvligari og hóskaði betur til politikk sjálvstýrisflokksins, sigur Kári Højgaard.

-Vit eru bara farnir í bólk við fólkaflokkin fyri at skipa stjórn. Ongar samráðingar hava verið um hvør politikkur skal rekast í eini komandi samgongu. Saman við fólkaflokkinum eru vit eisini ein bólkur upp á átta og tí fáa vit ávirkan, sigur Kári Højgaard.

Men hava tit ikki læst tykkum fastar við at fara í bólk við einum flokki?

-Vit hava arbeitt saman við fólkaflokkinum seinastu fýra árini, tú veit hvat tú hevur saman við honum, og tú veit ikki hvat tú fær saman við øðrum. Løgmaður hevur breiða undirtøku millum veljararnar sum løgmaður, betri enn formenninir í javnaðarflokkinum og sambandsflokkinum. Hann er diplomatur, so standa enn vit við okkara. Tað eru eisini nógv vallyfti sum kunnu fáast í gjøgnum við einum minnilutalandstýrið. Okkara avgerð um at vera saman við fólkaflokkinum byggir á, at hetta er tryggasti mátin hjá okkum at fáa ávirkan, sigur Kári Højgaard.

Verkfallið:

# Trupult at ferðast

**Summi vilja vera við at tað hevur ongantíð verið so gott ferðasamband um firðirnar sum nú meðan verkfallið hjá Skipara og Navigatørfelagnum hevur verið. Men harvið er ikki sagt, at tað gongur so leikandi lætt fyri tað. Tað mátti ferðalagið, sum fór til Scilly oyggjarnar sanna**

VERKFALL
*Solby A. Eliasen*

Ferðalagið, sum taldi átjan fólk, skuldi flúgva úr Føroyum sjálvan valdagin klokkan ellivu. Av hesum átjan vóru átta úr Klaksvík. Tey gjørdu av at fara úr Klaksvík mánakvøldið fyri at tryggja sær, at øll sluppu yvir á fastlandið í senn. Av tí at onki buss samband er til teir seinastu túrarnar yvir um Leirvíksfjørð, so noyddust tey at fara úr Klaksvík longu klokkan sjey. Og tá tey komu til Havnar, komu boð frá Róðrarsambandinum, at tey høvdu frætt, at Vágoyggin fór at verða blokerað dagin eftir.

So ferðalagið fór úr Havnini til Vestmanna við bussi klokkan hálvgum seks týsmorgunin. Tá helt onkur fyri, hvussu gott tað var, at klaksvíkingarnir vóru farnir kvøldið fyri. Úr Vestmanna var farið við báti yvir um til Oyrargjógv og tað gekk upp á stás. Men nú var ferðalagið í Vágunum longu klokkan gott sjey og flúgvarin hjá Atlantsflog fór ikki fyrr enn klokkan ellivu. Men gott fólk var tíðliga á fótum í Sandavági henda morgunin, so tey átjan fingu ein góðan morgunmat í SÍF húsinum, sum RSF bjóðaði.

Um hálvgum tíggju tíðina fór ferðalagið so víðari til Flogvøllin, og har frá gekk leiðin so til Kastrup og ein sera drúgvur túrur vestur í Vágarnar var komin at enda.

Ferðalagið var burtur í eina viku, og tá tey komu aftur gekk ferðin betur úr aftur Vágoynni. Men tey, sum skuldu yvir um Leirvíksfjørð, fingu enn einaferð fylgjurnar av verkfallinum at føla, tá tey komu til Leirvíkar. Tí bussurin steðgaði við Statoil støðina, og bussførarin segði, at boð vóru komin úr Havnini, at bussarnir ikki skuldu koyra inn í bygdina til fiskarí havnina undir Tavuni, har Alfa Pilot leggur at.

Sum vera man kom øgi í onkran, men bussførarin segði, at ferðalagið ikki skuldi skelda hann, men heldur Regin Vágadal, tí tað var hann, sum hevði givið boðini.

Ferðafólkið fór so suffandi úr bussinum og draggandi til gongu við tí nógva og tunga viðførinum. Tá tók onkur til, at fyri tað, um Regin Vágadal megnar at bera fleiri bingjur, so er harvið ikki sagt, at øll klára tað.

Regin Vágadal, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at orsøkin til at bussarnir ikki skulu koyra inn í Leirvíksbygd er fyri tað fyrsta, at tað er kommunalt øki, og har hava bussar hjá Bygdaleiðum onki at gera.

– Onkrir bussførarar siga seg eisini ikki klára at halda ferðaætlanina, sum frammanundan er sera knøpp, sigur hann.

– Tí hava vit valt at hava eina greiða linju til hetta og siga, at bussarnir koyra oman til ferjuleguna í Leirvík og ikki inn í bygdina, sigur Regin Vágadal.



# Títtlingarnir hátíðarhildu dagin

**Kristi Himmalferðardag fyltu títtlingarnir hjá KFUK skótunum í Føroyum 70 ár. Í hesum sambandi var skipað fyri ymsum tiltøkum**

FØÐINGARDAGUR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Skótarnir vóru fyrrapartin í kirkju, og síðani ótu teir døgurða á Hotel Hafnia. Dagurin varð eisini hildin fyri almenninginum, og skipað var fyri ymsum tiltøkum uppi í KFUK í Havn. Heilt fitt av fólki var komið saman at hátíðarhalda dagin saman við skótunum, og var tað eitt hugnaligt umhvørvi uppi í KFUK seinnapartin hósdagin.



*Jona Henriksen var ein av fyrstu títtlingunum, sum vórðu til fyri 70 árum síðani*



*Børn grillaðu popcorn*



*Skipað varð eisini fyri felagssangi á KFUK trøðni*



*Eisini varð bál kynt*

# Datt og doyði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Týskvøldið 7. mai, var ein 55 ára gamal maður óhaldsin, og datt í trappunum uttanfyri Ebenezer í miðbýnum í Havn. Frá politistøðini í Havn verður sagt, at alt bendi á, at maðurin var ávirkaður av rúsdrekka. Hann datt og smekkaði høvdið í, og varð síðani innlagdur á Landssjúkrahúsið. Maðurin varð stabiliseraður, men fekk eitt tilbakarfall og doyði. Hildið verður, at hetta var av fallinum, men tað er ikki vist.



*Týskvøldið datt ein 55 ára gamal maður í trappunum uttanfyri Ebenezer í Havn. Maðurin doyði, men ikki er vist um tað var av fallinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




**En helt igennem delikat oplevelse.**
Cliniques Moisture Sheer Lipstick SPF 15.

Transparente farvestrejf lægger sig smukt på læberne. Beskytter med solfaktor 15.
Tolv delikate farver i hver deres slanke etui.
Det uimodståelige lille farvekys, som altid er så fristende.
Forkæl dig selv.

**Moisture Sheer Lipstick SPF 15, kr. 135,-**

**Clinique.**
**100% uparfumeret.**

Kom forbi eller ring og bestil tid til en gratis demonstration.
(Forhandler)